# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samgongumøguleikar

Fleiri veljarakanningar eru gjørdar seinastu dagarnar. Tær eru ymiskar, og tí eiga tær eisini at takast við fyrivarni. Nýggjasta og feskasta og helst seinasta veljarakanningin til hetta løgtingsvalið verður kunngjørd í blaðnum í dag.

Hon kemur so til eitt annað úrslit enn tær undanfarnu, sum Sosialurin og Dimmalætting hava latið ávikavist Fynd og Gallup gera. Stóra broytingin er nú tann, at Tjóðveldi gongur aftur og missir tvey tingfólk. Sambandsflokkurin fær eitt tingfólk aftrat, sum ikki er nakað nýtt. Hin stóra broytingin er tann, at teir smærri flokkarnir fáa enn størri framgongd enn hinar kanningarnar hava víst. Miðflokkurin fær eitt tingfólk aftrat og sama ger Sjálvstýrisflokkurin.

Tað er áhugavert at bíta merki í, at smærri flokkarnir ota seg fram, og harvið kunnu teir eisini gerast tungan á vágskálini, tá samgonga skal setast saman næstu vikurnar.

ABC fær eftir hesi kanningini 22 tingfólk, eitt fleiri enn nú. BE fær 14 men røkkur meiriluta við H aftrat. Ein annar møguleiki er gamla heimastýrissamgongan BCD, ið eftir hesi seinastu kanningini fær júst magiska talið 17. Tá hugsað verður um ta ónøgd, sum hevur verið í Sambandsflokkinum og í Javnaðarflokkinum við Fólkaflokkin og sum er komið fram í valstríðnum, so er BCD uttan iva eitt boð uppá eina komandi samgongu. Tvs. at Fólkaflokkurin verður skiftur út við Sjálvstýrisflokkin, sum eitt nú í fiski- og búskaparmálum er meira í tráð við politikkin hjá B og C. Aðrir samgongumøguleikar út frá seinastu veljarakanningini er BCE við 21 tingfólkum. Annar møguleiki er AEDH við 18 tingfólkum. Enn ein møguleiki er ACH við 17 tingfólkum.

Skulu vit gita, hvør av hesum samgongumøguleikum er mest sannlíkur út frá verandi kanning og út frá tí floksformenn hava úttalað, so er tað, at verandi samgonga heldur fram. Men her eru tó nógv men, nú ósemja tykist vera um fleiri stórmál. Fólkaflokkurin hevur sum einasti flokkur megnað at vera partur av nærum øllum samgongu seinastu 20 árini. Fer hann at klára tað hesaferð eisini? Verður ABC av ongum, og eitt nú BED ikki megnar at fáa meirluta, er kanska mest sannlíka samgonga eftir valið BCD. Men BCE spøkir eisini.

**Sosialurin**

# Valstríðið sum ein óskiljandi fótbóltsdystur




**Tað var nógv stuttligari at hyggja eftir fótbólti í gomlum døgum. Í tíðini, tá áskoðarin ikki var ørkymlaður av, at liðini spældu í eins leikbúnum, brúktu sama taktikk og leikararnir líktust hvørjum øðrum**



SÍÐULINJAN
*Rólant Waag Dam*



Fótbóltsdysturin ikki tann sami longur. Av gomlum vana eru kortini nógvir áskoðarar til dystin. Men nógv er broytt og áskoðarin undrast. Tí tað var so nógv lættari at fylgja við fyrr. Og nógv stuttligari.

Nú stendur áskoðarin við síðulinjuna og veit ikki hvat hann skal halda. Hví ólukkan, spyrja teir seg sjálvan og hvønn annan, spæla liðini í somu litum? Hví brúka liðini neyvt sama taktikk? Hví líkjast spælararnir so ólukksáliga nógv, at tað er so at siga ógjørligt at siga hvør er hvør, hvar leikarin spælur og – ikki minst – hvat lið hann umboðar?

### Liðavrik gav úrslit

Meini so við, heldur áskoðarin fyri seg sjálvan, tað var nógv stuttligari at hyggja eftir fótbólti fyrr. Tú komst til dyst og tað var lætt at fáa eitt yvirlit yvir dystin. Annað liðið reytt, hitt blátt. Fínt, so var tað upp á pláss. Og tú helt annaðhvørt við tí bláa ella reyða liðnum. Tað var ikki so torført.

Liðini brúktu eisini hvør sín taktikk. Annað spældi kanska framrættað, meðan hitt hugsaði meiri um verjupartin. Felags fyri liðini var tó, at tey vistu, at besta úrslitið fekst tú við einum liðavriki. Fungeraði liðið ikki usm ein heild, so fekst ikki úrslit. Tað var grundleggjandi, vistu leikararnir.

Og leikararnir vóru ymiskir. Tað visti tú. Tú visti eisini hvør dugur var í teimum, hvat teir stóðu fyri og hvat tú kundi vænta av teimum. Teir stóðu saman sum lið, tá á stóð. Tóku felagstøk tí teir vistu, at eingin keta er sterkari enn veikasti liðurin.

Tá vóru eisini individualistar. Hesir herligu leikararnir, sum gjørdu tað óvæntaða. Ein frægd fyri eyga at eygleiða. Teir kundu enn tá avgera dystir einsamallir. Tá tað var neyðugt. Fyri liðið besta.

### Áskoðarin saknar sál

Hetta sært tú ikki í dagsins dysti. Nú tykiskt tað sum um, at leikararnir spæla hvør í sínum lagi. Teir hava gloymt liðið, gloymt hvønn teir umboða. Tað er keðiligt og lítið áhugavert at eygleiða. Og tí úrslitið er ein ósamanhangandi leikur, har allir spælararnir royna somu finturnar allatíðina. Og spælararnir gera ikki finturnar fyri at skapa málmøguleikar, soleiðis at lið teirra kann vinna dystin. Nei, teir gera finturnar fyri at imponera áskoðararnar. Ja, spælararnir hugsa meiri um at undirhalda fjøldina, enn at skaffa liði sínum eitt gott úrslit. Trupulleikin hjá spælarunum er bara tann, at teir hava bara gloymt, at áskoðarin hevur sæð hesar finturnar fyrr. Fleiri ferðir. Bæði á vøllinum og í sjónvarpinum. Útvarpið og Rás 2 hava umrøtt tær og bløðini skrivað um tað. Nú vil áskoðarin síggja okkurt annað.

Hann vil síggja fótbólt, sum hann var í gomlum døgum. Veruligan fótbólt, sum var stuttligur at eygleiða og kjakast um. Fótbólt har leikararnir løgdu lív og orku í, so at liðið fekk tað besta úrslitið og sigurin kom í hús. Fótbólt við rúkandi ferð og intensiviteti. Fótbólt við glíðandi takklingum og hørðum nærdystum. Fótbólt við herligum driblingum og frekum avleveringum. Fótbólt har tað bar til at koma ov seint til dystin, uttan at missa tað stóra, tí síðumaðurin visti altíð at siga tær, hvat støðan var, hvør hevði spælt betur og hvat var hent sum heild. Fótbólt við sál, har bæði leikarar og áskoðarar livdu og andaðu fyri spælinum á vøllinum.

Kemur tú til dagsins dyst og spyrt hvat støðan er, yppa øll øksl. Eingin veit at svara tær. Tí hvat skulu tey siga. Liðini hava sama lit, sama taktikk og leikararnir líkjast hvørjum øðrum.

Fyrr var hendi tað seg eisini, at ein hundur viltist inn á vøllin. Hann órógvaði ikki dystargongdina, men leikararnir steðgaðu á eina løtu og flentu saman við áskoðarunum at goyggjandi hundinum, til hann fann út av, at tað ikki var á fótbóltsvøllinum hann hoyrdi heima. Hetta síggja vit heldur ikki í dag. Gaman í, ein lítil fuglur hevur sett seg á vøllin í dagsins dysti, men hvørki leikarar, áskoðarar ella fjølmiðlar tykjast at hava lagt merki til hansara veiku pipp. So tað er bara ein spurningur um tí, áðrenn hesin verður trumlaður niður av 22 einslittum leikarum, sum allir renna sama veg, við sama renningarlag og somu ferð.

Í meðan stendur áskoðarin á síðulinjuni, ørkymlaður og droymir um gamlar dagar...

**Á SÍÐULINJUNI gera blaðfólk á Sosialinum viðmerkingar í sambandi við løgtingsvalið**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.